DAGFØR
TEG
sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg
sum haldara,
so fært tú
sosialin
5 ferðir um
vikuna
til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

- [ ] Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
- [ ] Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
- [ ] 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
- [ ] Onnur lond: Ymiskir prísir
- [ ] Internet: 240,-/ársfj.

**Hví ikki nýta summarið í Danmark?**

Vit sóknast eftir timburmonnum ella fólki sum duga at smíða, at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiði er á Sælandi og Jútlandi og treytirnar eru góðar.

Ert tú timburmaður ella dugir at smíða og hevur hug at vinna nógvan pening, so er hetta nakað fyri teg.

Ring á tlf. 210626 og fá nærri at vita.

**Sp/f Fær-Byg**

**Summarfrí**

Vegna summarfrí er skrivstovan stongd frá 17. juli til og við 28. juli 2000.

**Advokatfirma Annfinn V. Hansen.**

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA




Sosialurin - 311820

**GLAÐING**
- føroyska mánaðarblaðið er at fáa á hesum støðum:

**Norðoyggjar:**
Shell Quick Service, Stangavegi, Klaksvík
Statoilstøðin, N. Pálsgøtu, Klaksvík
Kioskin hjá Ann, Klaksvíksvegi, Klaksvík
Kioskin v/ Andreu Gaard, Klaksvíksvegi 59, K.
Tuck Shop, Klaksvíksvegi 65, Klaksvík
Kiosk Sigrið, Klaksvík
Hotel Norð, Viðareiði

**Eysturoy:**
Shell-støðin á Oyrarbakka
Statoil, Skálabotni
Statoil, Heiðavegi, Saltangará
Statoilstøðin á Strondum
Kiosk Vár, Runavík
Kioskin við Toftagjógv, Toftir
Shell-støðin í Gøtudali
FK, Fuglafirði
Joma, Skála
Stranda Centrum

**Norðstreymoy:**
Shell-støðin inni á Fjør, Vestmanna
Statoil-støðin, Kollfjarðadali
Hjá Børge, Kollafjørður

**Tórshavn/Argir:**
H. N. Jacobsens bókahandil
Hjalmar Jacobsens bókahandil
Bókasølan í SMS
Bónus
FK-Hoyvík
FK, Dr. Jacobsensgøta
Kiosk Activ
P. A. Restorff
Ternubúðin
Frants Restorff, bakarí
Hjá Gunnleivi, Landavegi
Hjá Gunnleivi, Hoyvíksvegi
Shell við Norðara Ringveg
Statoil-støðin í Gundadali
Hornið, SMS
Bakaríið Mylnan
Kiosk Sentrum, Handilskjarnin
Kiosk Svalin
Video 2000, Per Mohrsgøtu, Hoyvík
Kioskin í Hoyvík, Hvítanesvegi
Hornabúðin, J. Dalsgøta, Hornabø
Bónus, Smyrilsvegi
Garðsbúðin, Argir
Argjabúðin, Argir
Statoil-støðin, Argir

**Vágar:**
Kafeteria á flogvøllinum
Myllan, Miðvági
FK Vágar, Miðvági

**Nólsoy:**
Hjá Anfinn

**Sandoy:**
Shell-støðin, Sandur
Statoil-støðin,Sandur

**Suðuroy:**
Tangabúðin, Tvøroyri
FK, Trongisvági
Shell-støðin á Oyri, á Bakka, Vági
Fa. Dahl, v/ Solveig Johansen, Vági



# Føroyingur kannar nyttuna í heilivági

*Betty Lómstein Pedersen vardi 9. juni ph. d. ritgerð, har málið hevur verið at koma longri á vegnum at finna fram til, hvussu heiligvágur betri kann koma til sín rætt*



*Tað stendur Betty Lómstein Pedersen nú í boði at halda fram at granska, samstundis sum henni stendur í boði at undirvísa teimum, sum lesa á instituttinum í Keypmannahavn*

JÓANNES HANSEN

Tað er av stórum týdningi, at tað verður granskað. Hesa vendingina hevur tað aftur og aftur verið tikið til. Seinast hoyrdu vit hana, tá ráðstevnan um gransking í sambandi við fiskivinnuna var í Norðurlandahúsinum.

At føroyingar ikki standa aftanfyri onnur, tá tað ræður um at granska, verður aftur og aftur staðfest. Og nú hava vit aftur fingið hetta staðfest.

Fríggjadagin 9. juni vardi Betty Lómstein Pedersen, sum er ættað av Toftum og býr í Glostrup, ph.d ritgerðina hjá sær. Tað gjørdi hon á farmaseutiska instituttinum á farmaseutiska háskúlanum í Keypmannahavn.

Heitið á ritgerðini var Gastrointestinale væskers rolle for opløsning af tungtopløselige lægemiddelstoffer.

Heitið tykist tungt og torskilt, men setningurin er sera áhugaverdur, og hann er serliga áhugaverdur hjá heilivágsídnaðinum. Hjá teimum hevur tað stóran týdning at skilja og fáa innlit í, hvussu evnini, ið eru tungt upploysilig, skikka sær í sambandi við heilivág og harvið ávirkanina, sum heilivágurin hevur. Heilivágurin skal jú upploysast í tarmunum fyri at fara í blóðið og harvið hava tað árinið, sum hann er ætlaður til.

Trupulleikin við tungt upploysiligu evnunum er, at tey kunnu fara útaftur, uttan at tey eru upployst. Tað hevur tað fyri heilivágin óhepnu avleiðing, at árinið verður minni, enn tað kanska varð roknað við, ella at árinið verður minni støðugt, enn tað hevði verið ynskiligt.

## Málið

Betty Lómstein Pedersen varð studentur í fyrsta árganginum við Gøtugjógv. Tað var í 1985. Í januar í 1993 leyk hon farmaseutiskt embætisprógv í Keypmannahavn, og í 1995 fór hon undir granskingararbeiðið. Málið hjá henni var partvís at fáa eina størri fatan av, hvussu evni verða upployst í sevjunum í magatarmunum, og partvís at finna fram til onkra kunstiga sevju, sum kann brúkast í royndarrúmum.

Betty sær sítt arbeiði sum eitt klípi afturat tí nógva kanningarvirkseminum, sum gongur fyri seg í t.d. USA, Svøríki og Týskalandi, og hon hevur í ritgerðini víst á fleiri onnur øki, enn tey, sum hon hevur arbeitt við, og sum hava týdning fyri heildarfatanina av spurninginum.

## Mátin

Burtursæð frá einum ári, tá hon var burturfrá í barnsburðarfarloyvi, hevur Betty Lómstein Pedersen síðani í 1995 og fram til í summar arbeitt á Instituttinum fyri Farmaci í Keypmannahavn.

Arbeiðið hevur m.a. fevnt um at kanna, hvussu skjótt tungtupploysilig evni upploysast ella, hvussu væl tey upploysast. Hetta er gjørt við at brúka tvey so kallað modelevni og við at nýta magatarmsevjur frá menniskjanum og kunstigar magatarmsevjur.




*Betty Lómstein Pedersen varð studentur í fyrsta árganginum við Gøtugjógv. Tað var í 1985. Í januar í 1993 leyk hon farmaseutiskt embætisprógv í Keypmannahavn, og í 1995 fór hon undir granskingararbeiðið*

## Úrslitini

Eftir at hava arbeitt í fýra ár við stóra og spennandi spurninginum, vardi Betty Lómstein Pedersen 9. juni ritgerðina, sum hon hevur latið úr hondum.

Ein av niðurstøðunum var, at gallið hevur stórt árin á gongdina í upploysingini. Tá maturin fer úr maganum og sodningin skal halda fram, verður maturin blandaður við gallið. Saman við galli og sevju frá búkspýtskertlinum fer stór niðurbróting av t.d. feitti fram. Gallmongdin er óstøðug. Betty hevur í ritgerðini víst á, at fyri tungtupploysilig evni hevur gallið serliga nógv at siga.

Eitt annað av úrslitunum hevur verið, at Betty er komin við uppskotum um kunstigar sevjur, sum kunnu brúkast at kanna upploysingsgongdina og upploysningsferðina hjá evnum í nýggjum heilivágum.

Ein niðurstøða var, at hon heldur tað vera týdningarmikið at halda fram við systematiseringini av evnum. Í sínum arbeiði hevur Betty, sum omanfyri nevnt, brúkt tvey evni. Hon heldur, at tað er neyðugt at gera kanningar við nógv fleiri ymiskum evnum.

## Altjóða kent

Tá Betty Lómstein Pedersen vardi ritgerðina, vóru opponentarnir tríggir í tali. Sjálvsagt er tað felags fyri teir, at teir hava ph.d. heiti, og at teir hava fingist nógv við spurningin, sum Betty Lómstein Pedersen nú hevur fingist við og skrivað ritgerð um.

Ein tann størsti kapasiteturin á økinum eitur J. B. Dressman. Hon er ættað úr Australia, og hon arbeiðir í Frankfurt. Hon var ein av opponentunum. Ein annar var sviin Bertil Abrahamsson, sum arbeiðir hjá kendu heilivágsfyritøkuni AstraZeneca (áður vóru Astra og Zeneca kappingarneytar, men nú eru tær ein og sama fyritøka). Síðsti opponenturin var Sven Frøkjær, sum er professari á farmaseutiska háskúlanum í Keypmannahavn.

Ritgerðin var góðkend, og tað stendur Betty Lómstein Pedersen nú í boði at halda fram at granska, samstundis sum henni stendur í boði at undirvísa teimum, sum lesa á instituttinum í Keypmannahavn.

At áhugin fyri evninum er stórur sæst eisini av, at tað hava verið fleiri, sum hava verið forvitin eftir at frætta, hvat tað er, sum Betty hevur fingist við. Tríggjar ferðir hevur hon luttikið á ráðstevnum, har hesin stóri og viðkomandi spurningurin hjá ikki minst heilivágsídnaðinum hevur verið viðgjørdur. Ein av ráðstevnunum var í París, ein onnur í Berlin, og so var Betty eina ferð í New Orleans í USA. Í sambandi við granskingararbeiðið var hon eitt stutt skifti í Uppsala í Svøríki, har hon gjørdi royndir í samarbeiði við svenskar granskarar.

Eftir at hon í 1993 var liðug at lesa, arbeiddi Betty í eitt ár á Løvens Kemiske fabrik. Tey, sum hava kannað omanfyri nevnda spurning, fáa ofta starv í heilivágsídnaðinum. Men Betty hevur í fyrstu atløgu ikki tikið aðrar avgerðir um framtíðar arbeiði, enn at hon ætlar at taka av tilboðnum um starv í hálvt annað ár, sum hon hevur fingið frá instituttinum, har hon bæði hevur verið studentur og ph. d. kandidatur.